# Land Cruiser og Mazda BT






Mazda BT-50 Feestyle Cab við 2,5 við turbo dieselmotori og 143 hk

**Í sendingini Bylgjan hjá Kringvarpinum hesa vikuna vórðu tveir bilar ummældir: Luksus jeepurin Toyota Land Cruiser 100 og Mazda BT 50 Freestyle Cab, sum er ein nútímans 4x4 pick-up**

BILAR

Bilarnir sum vórðu ummældir í sendingini Bylgjan hjá Kringvarpinum mikudagin 21. november vóru Toyota Land Cruiser 100 TD LS við 4, 2 (6 syl.) turbo dieselmotori og 204 hk, og Mazda BT-50 Freestyle Cab við 2,5 við turbo dieselmotori og 143 hk.

Fyrri bilurin, ið varð royndarkoyrdur, var ein Mazda BT 50, sum er ein nýggjur modernaður pick-up, sum fæst í fleiri útgávum: Regular Cab, Freestyle Cab, Double Cab og sum Chassis (Regular Cab).

Ongin hurðastólpi millum síðuhurðarnar ger, at bilurin er sera arbeiðsligur, og lætt er at handfara arbeiðsamboð ella hvat tað skal vera inn og út úr kabinuni.

Innan er BT-50 sum ein vanligur persónbilur. Allar útgávurnar hava sum standard t.d. airbag, el-síðurútar, el-síðuspegl, sentrallás, hita í setrunum og radio við fløguspælara og møguleika til MP3-spælara.

Bilurin sum varð royndarkoyrdur var ein Mazda BT 50 við SUMO pakkanum og kostar 282.000 krónur. Mazda BT50 kann síggjast og roynast hjá Bilasøluni í Hoyvík.

Prísirnir byrja við 217.000 krónum.

### Toyota Land Cruiser

Seinni bilurin var ein Toyota Land Cruiser 100 TD LS automatic við 4, 2 (6 syl.) turbo dieselmotori við 204 hk. Snúningsmoment 430 Nm v.1200 snún/min

Talan er um ein stóran 7-persónabil við allari útgerð sum t.d. leðurkabinu, køliskápi, bakkikamera, sóltaki, el-stilling av forsetrunum og annars øllum sum hoyrir til ein luksusbil. Eisini hevur hann t.d. luftfjaðraskipan, sum kann stillast í hædd (fríhæddina), og undirvogn sum kann stillast frá komfort til sport.

Viðførisrúmið er 830 litrar, og bilurin vigar 2450 kg.

Bilurin, sum varð royndarkoyrdur, kostar 895.600 krónur. Annars fæst Land Cruiser sum vøruvognur frá 594.600 hjá Reyni Service.

Fróði Løksagarð stóð fyri sendingini, og bilaummælarar vóru Óla Jákup Rólantsson frá Vikublaðnum, og Magnus Gunnarsson frá Sosialinum.

mg





Toyota Land Cruiser 100 TD LS automatic við 4, 2 turbo dieselmotori og 204 hk

# Skoda sponsorera Tour de France




Skoda Auto hava undirskrivað sáttmála við ASO, sum er felagið sum stendur fyri Tour de France súkklukappingunum

Skoda Auto hava undirskrivað ein 4-ára sáttmála við ASO, sum er felagið sum stendur fyri Tour de France súkklukappingunum. Skoda er sostatt millum teir stóru sponsorarnar av Tour de France í tíðarskeiðinum 2008 til og við 2011.

Súkkling er ein ítróttargrein sum nógv fólk í øllum heiminum fylgja við í, umframt at súkkling eisini er ein frítíðaraktivitetur hjá milliónum um allan heim. Roknað verður við, at hetta verður ein sera góð reklama fyri tey ymisku modellini hjá Skoda.

Skoda í Danmark hava síðan 2004 verið lokalir sponsorar fyri toymið hjá Bjarne Riis, Team CSC, sum í løtuni er eitt av heimsins bestu professionellu súkkluliðum.

mg